## Grønlendsk børn svølta

Í Grønlandi er komið undan kavi, at fleiri børn fara svong til songar. Hetta kemur eftir at ein genta hevur sagt, at hon letur síni yngri systkin eta áðrenn hana, og so er tað ikki altíð, at matur er í avlopið til hennara. Somuleiðis hevur ein smádrongur avdúkað, at hann má fara úr skúlanum fyri at skaffa mat til familju sína. Hetta hevur danski mannafrøðingurin, Sissel Lea Nielsen, eisini staðfest í einari kanning saman við MIPI Videnscenter.



## Ny Alliance fingið vallista

Danska innlendismálaráðið hevur góðkent nýggja flokkin hjá Naser Khader, Ny Alliance. Flokkurin hevur valt at stilla upp undir valbókstavinum Y. Hetta fortelur ein av floksstovnarunum, Gitte Seeberg. Hetta er fyrstu ferð síðan í 70'unum, at ein danskur flokkur hevur bókstavin Y. Tá var tað Venstresocialisterne, ið teknaðu seg undir bókstavinum. Ny Alliance varð sett á stovn 7. mei í ár.

# skipari og politikari

band við eftirkomararnar hjá manninum, sum í sínari tíð seldi Lunar Bow til Vágs.

– Hin gamli fiskaði ongantíð sunnudag, og tað gjørdu synir og seinni abbasynir hansara heldur ikki.

Nógvar rembingar hava verið í skotsku fiskivinnuni gjøgnum árini, og vinnan hevur bæði havt uppgongd og niðurgongd.

– Hesir menninir munnu vera millum teir lutfalsliga fáu, sum øll árini hava verið virknir og hava hildið seg omaná.

Enn kallast eitt av nótaskipunum hjá teimum Lunar Bow.

### Stórir møguleikar

Henrik Old dylur ikki, at hann fegnast um, at føroyingar aftur eru farnir at sigla upp á Skotland, nú við nýggju Norrønu.

– Eg haldi, at hetta er eitt óføra gott og spennandi tiltak, og eg síggi stórar møguleikar í hesi rutu. Føroyingar eru aftur farnir at handla meira í Skotlandi, og eg havi varhugan av, at tað serliga eru tær yngru kreftirnar í føroyska handilslívinum og vinnulívinum annars, sum eru farnir at brúka henda møguleika.

Hann vísir á, at Skotland er okkara nærmasti granni, og tí er tað burtur við, um vit ikki gera brúk av hesum møguleika, nú vit hava hann.

– Føroyingar, sum hava verið í Skotlandi, kenna seg ógvuliga væl – og kenna seg sera væl móttiknar. Skotar eru ógvuliga fyrikomandi, hjálpsamir og trúfastir, endurtekur hann.

### Fantastiskt land

Henrik, sum var førarin á ferðini hjá honum og konuni, heldur ikki, at vinstrakoyringin í Skotlandi er nakar sum helst trupulleiki.

– Skotar eru eisini "gentleman" í ferðsluni, og er nakað áfatt hjá tær, steðgar onkur bilur og spyr, um hann kann hjálpa. Soleiðis eru skotar bara.

Hann er ikki í iva, tá vit spyrja hann, um hann vil mæla føroyingum til at ferðast í Skotlandi sum alternativ til tær rutur hjá Smyril Line, sum longu eru fult bookaðar.

– Ja, eg vil so avgjørt mæla fólki til at taka sær nakrar frídagar í Skotlandi, sum er eitt so fantastiskt land.

Henrik sigur seg síggja ljóst upp á hesa farleið, nú vit hava eitt munandi betri skip enn áður til hesa sigling.

– Eg vóni, at hetta bara er byrjanin, soleiðis at farleiðin sum frálíður eisini verður sigld um veturin. Hetta er ein møguleiki, sum eisini er yvirkomiligur hjá vanligum fólki, tá ræður um ferðaseðlaprísir, leggur hann aftrat.

### Sum avloysari

At kalla hvørt mansbarn kennur mannin, men eitt, sum vit ikki vistu, nú vit høvdu hann hinumegin borðið, er, at Henrik í eini 13 ár hevur brúkt ein stóran part av síni summarfrí umborð á svenskum nótabátum.

– Eg havi soleiðis loyst av sum skipari við nótabátum, sum serliga fiska sild í Norðsjónum um summarið.



*Hetta er nýggja útgávan av nótaskipinum Lunar Bow, ið er sama skipanavn, sum í síni tíð knýtti saman skotska familju í Peterhead og føroyingar*

… Hann sigur, at talan er um skipaeigara, sum hann kom at kenna á ungum árum.

– Tað var einaferð, at teimum vantaðu ein skipara at loysa av, og síðan tá havi eg fylgt hesum monnum. Eitt vinarlag er soleiðis bygt upp okkara millum gjøgnum øll hesi ár. Hesir menn hava góð skip, og mær dámar sera væl at sleppa útaftur at fiska, tá høvið býðst, sigur Henrik Old, sum eisini var við til móttøkuna á Weigh Inn hotellinum í Thurso, tá Norrøna var á síni fyrstu almennu ferð í Scrabster.



*Henrik sær ljóst upp á nýggju rutuna hjá Norrønu, nú vit hava eitt munandi betri skip enn áður til hesa sigling. - Eg vóni, at hetta bara er byrjanin, sigur hann*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*